gult4 cyan4 magenta4 svart4

Stór útbygging á Prentmiðstøðini

Einasta blaðprentsmiðjan í Føroyum verður útbygd í hesum døgum

BLAÐPRENT
Eirikur Lindenskov

Tey, ið lesa Sosialin, hava lagt til merkis, at blaðið seinastu dagarnar hevur verið heldur »óruddiligari«, enn blaðið plagar at vera. Orsøkin er, at stór umbygging fer fram á Prentmiðstøðini, sum Sosialurin og Dimmalætting eiga í felag.

– Í løtuni eru vit í ferð við at seta upp eitt nýtt fýrahøgt littorn, sigur Eyðun Húsgarð, stjóri á Prentmiðstøðini. Hetta tornið er tann parturin av prentsmiðjuni, sum kann prenta átta síður í Sosialstødd í litum – við góðari dygd.

Sum nú er ber til at prenta átta síður í Sosialinum í litum. Við at »snýta« eitt sindur, ber til at prenta 12 síður, men tá er góðskan ikki heilt í lagi. Tá útbyggingin er liðug, ber til at prenta 16 síður í Sosialinum í litum í bestu dygd.

Teir hava sett upp trý av teimum fýra litverkunum upp, eitt til hvønn litin, reytt, gult, blátt og svart. Á myndi sýggjast Peter Johannesen, umboðsmaður fyri prentmaskinurnar í Danmark, Eyðun Húsgarð, stjóri á Prentmiðstøðini, og Palli Durhuus, húsavørður á Dimmalætting

Mynd: Jens Kristian Vang

Prentsmiðjur lagdar saman

Nógv er broytt innan blaðprent í Føroyum seinastu árini. Fyri einum átta árum síðani vóru tvær rotatiónsprentsmiðjur í Føroyum, ein á Sosialinum og ein á Dimmalætting. Men fara vit eitt sindur longur aftur, so vóru uppaftur fleiri prentsmiðjur, sum prentaðu bløð. Dagblaðið hevði sína egnu rotatión, sum fórt í eldinum í 1989, og Fjúrtandi September hevði egna prentsmiðju, tá blaðið hevði til húsa í Vágsbotni hjá Fiskimannafelagnum.

Men miðsavnanin, ella menningin, sum onkur vil siga, hevur ført til, at tað nú bert er ein blaðprentsmiðja í Føroyum.

Fyri einum ári síðani vórðu prentsmiðjurnar hjá Dimmalætting og Sosialinum lagdar saman í eitt felag, sum eitur Prentmiðstøðin. Hendan prentsmiðja leigar hølini á Dimmalætting.

Tær bestu maskinurnar hjá ávikavist Dimmalætting og Sosialinum eru settar saman, og í hesum døgum verður so eitt spildurnýtt littorn sett upp afturat, sum ger, at Sosialurin kann prentast í 56 síðum, harav sekstan kunnu prentast í litum. Tosa vit um dimmustødd, so kann Dimmalætting prentast í 28 síðum, har av átta síður kunnu prentast í litum.

Maskinur úr Chigago

Nýggju maskinurnar hjá Prentmiðstøðini eru keyptar úr Chigago, og eru fólk frá felagnum komin til Føroya at seta maskinurnar upp. Talan er sjálvsagt um stóra umbygging, og verða samstundis aðrar ábøtur gjørdar á gomlu maskinurnar. Eisini skal nýggj elveiting leggjast inn á prentsmiðjuna, tí nýggju maskinurnar hava tørv á munandi meiri streymi, enn tær gomlu – og so nógvan streym hava teir ikki ímyndað sær at skula brúkt, tá bygningurin hjá Dimmalætting varð bygdur miðskeiðis í áttatiárunum.

Men er so tørvurin á prenting í Føroyum nøktaður?

– Tað fáa vit at síggja. Tað vísir seg, at hvørja ferð møguleikarnir økjast, so økist tørvurin tilsvarandi, sigur Eyðun Húsgarð, sum kortini leggur dent á, at hetta fer at bøta munandi um dygdina – og um tørvurin økist enn meira, so er einki í vegin fyri enn eini útbygging, sigur hann.

Hóast Prentmiðstøðin nú ongan kappingarneyta hevur í Føroyum, so eru fleiri kappingarneytar í Danmark, sum prenta nógv lýsingarbløð, sum koma á føroyska marknaðin. Bløðini, sum verða prentað á Prentmiðstøðini eru:

Dimmalætting
Sosialurin
Oyggjatíðindi
Norðlýsið
Dagblaðið
FF-Blaðið
Trúboðin
Fregnir

Umframt prentar Prentmiðstøðin eisini fleiri lýsingarbløð, eitt nú Bónusblaðið, Balslevblaðið o. fl.

Útbyggingin á Prentmiðstøðini verður neyvan liðug fyrr enn næsta vika er farin, og verða útgávurnar hjá Sosialin tí skerdar hetta tíðarskeiðið. Men Sosialurin ætlar at prenta leygardagsblaðið í tveimum sektiónum, so pláss fæst fyri tilfarinum.

Menn frá prentsmiðjuverksmiðjuni í Chicago eru komnir til Føroya at seta upp nýggju prentmaskinuna
Mynd: Jens Kristian Vang

Kappsiglingar summarið 2001

TÍÐINDASKRIV:
Vegna áhugafelagið Seglið
Regin Debess

Tá ið lýggja summarfleyrið kemur av útsynningi, og sólin skyggir á fjørðin, er stundin komin at flota bát.

Seglið stendur frá, og báturin smýgur sær ljóðliga avstað. Bert skvalið í framskutinum og suttlanin í súðunum hoyrist.

Hugnaligt góðveðursprát fram við landi.

Aftur í ár fer áhugafelagið Seglið at skipa fyri kappsiglinum við teimum snærru bátunum, serliga 4- og 5-mannaførum, men tristar og tríbekkir kunnu vera við.

Skipað verður fyri trimum kappsiglingum.

Tann fyrsta verður á eystanstevnu í Runavík.

Tann næsta verður møguliga í Hvalvík á sundalagsstevnuni.

Tann triðja siglingin verður á Hvítanesi leygardagin 21. ella sunnudagin 22. juli.

Lýst verður nærri, nær og hvar kappsiglingarnar verða.

Vit hava í nøkur ár roynt eina skipan við stigum, men í ár er semja um ikki at geva stig.

Hvør sigling verður ein kapping fyri seg.

Nummar 1, 2 og 3 fáa virðislønir, sum vanligt.

Tað hevur verið eitt sindur av roksi burturúr og havt við sær eina ávísa missnøgd at geva stig, og tað liggur kanska eisini eitt sindur fjart frá okkara mentan at geva stig fyri alt. Men eina eggjan til kapping hava stigini hóast alt elvt til.

Viðvíkjandi tilmeldingum skulu bátarnir melda seg til hvørja kappsiglingina sær. Einki luttøkugjald verður, men roynt verður at skaffa pening við at luta nøkur smáting burtur hvørja ferð.

Okkurt verður tó sum fyrr. Kaffi og pannukøkur verða at fáa aftaná siglingina og við hugnalig løta við práti, reypi og handan av steypum.

Sagt verður frá, at norðurlendska siglistevnan Vinden drar verður í ár í Danmark. Byrjað verður í Roskilde sunnudagin 1. juli og endað verður í Iseførðinum leygarkvøldið.

Endamálið við kappsiglingum hjá okkum er fyrst og fremst, at fólk kunnu læra seg at brúka seglið, at varðveita síðin við árabátum og at geva góðar upplivingar í sjónum.

Vónandi fara nógv ung fólk at fáa hug at sigla, tí tað er neyðugt hjá okkum sum sjófarandi tjóð.

gult5 cyan5 magenta5 svart5

Skulu fundast í Klaksvík

– Tað er eitt tekin um veikleika, at býráðsmeirilutin rýmir úr Klaksvík at fundast, heldur Jógvan við Keldu, fyrrverandi borgarstjóri í Klaksvík

POLITIKKUR
Eyðun Klakstein

Klaksvík: Tað er ein óskikkur at fara út um kommunumark at halda fund, og at fara til Viðareiðis at halda fund um fíggjarætlanina er fjant og fjas.

Tað heldur Jógvan við Keldu, sum síðani 1980 hevur staðið á odda fyri býráðsmeirilutanum í 16 ár. Nú er hann í minnilutanum í Klaksvíkar býráði.

Meirilutin í Klaksvíkar býráði arbeiðir í hesum døgum við fíggjarætlanini fyri komandi ár, og í tí sambandi hava tveir fundir verið hildnir á Viðareiði.

Borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, er væl nøgdur við hesa fundir, sum hann heldur hava verið við til at samansjóða nýggja meirilutan betri.



– Eitt er at fara úr býnum einaferð, men at tað skal gerast ein vani fyri at fáa arbeiðsfrið er vánaligt tekin. Tað er bara í undantaksstøðu, at leiðslan rýmir úr býnum, heldur Jógvan við Keldu, fyrrverandi borgarstjóri í Klaksvík

Politikarar órógva

Jógvan við Keldu heldur, at tað er veikleikatekin, meirilutin fer úr kommununi at fundast.

– Vit hava helst besta býráðshúsið í Føroyum, og tað kann hýsa øllum slíkum fundum. Umframt tað hava vit eina sera góða umsiting, sum eg kenni gjøgnum mong ár.

– Tí hevur tað undrað meg, at vit hava fingið ikki færri enn tvinni brøv frá leiðsluni í býráðnum, har fundir hava verið útsettir, tí at arbeiðsbyrðin hjá embætisfólkunum er so nógv økt aftaná 1. január.

– Ein orsøk kann verða tann, at politikarar og embætisfólkið ikki skilja ímillum, hvat er politikkur og embætisførsla, so at politikarar órógva ov nógv embætisfólkið, heldur Jógvan við Keldu.

– Tá leiðslan ikki er nóg sterk, verður somikið meiri tosað, men tað er ikki altíð, at tað kemur tað besta burtur úr hesum.

Undantaksstøða

Jógvan við Keldu ætlar sær ikki at gera meiri við málið enn at mæla meirilutanum til at fundast á heimavølli.

– Býráðsmeirilutin í Klaksvík eigur at halda sínar fundir innan fyri kommunumark í Klaksvík og ikki á Viðareiði. Í hvussu so er so leingi, sum kommunurnar ikki eru lagdar saman, sigur Jógvan við Keldu.

– Eitt er at fara úr býnum einaferð, men at tað skal arbeiðsfrið er vánaligt tekin. Tað er bara í undantaksstøðu, at leiðslan rýmir úr býnum, heldur hann.

Fyrilestur um kenslulív

Danin Steen Palmquist heldur leygardagin fyrilestur í Klaksvík um náðigávur og kenslulív

»Kann kenslulívið gerast ein forðing fyri, at náðigávurnar koma í brúk«.

Soleiðis kallar Steen Palmquist fyrilestur, sum hann fer at halda í KFUM & K í Klaksvík leygardagin.

Steen Palmquist er kendur terapeutur hjá danska felagsskapinum AGAPE. Hann hevur áður verið í Føroyum og hildið skeið – seinast á hjúnalegu á Toftum.

Tað er føroyska deildin hjá AGAPE, sum skipar fyri fyrilestrinum í Klaksvík.

Fyrilesturin verður leygardagin kl. 19.30, og tað kostar 100 krónur at verða. Hesir pengar fara til at gjalda fyri ferðaútreiðslurnar hjá danska terepeutinum.

Norðoya Sparikassi letur deild aftur

Norðoya Sparikassi letur 5. juli deildina hjá sær við Stangavegin í Klaksvík aftur

Minkandi tørvur á avgreiðslum ger, at Norðoya Sparikassi letur aðra av smáu deildunum í Klaksvík aftur

PENINGASTOVNUR
Eyðun Klakstein

Klaksvík: 5. juli letur Norðoya Sparikassi deildina hjá sær á Stangavegnum í Klaksvík aftur.

Eftir tað skulu viðskiftafólk hjá sparikassanum í Klaksvík gera síni ørindi í høvuðsdeilini á Ósávegi ella á deildini við Klaksvíksvegin.

– Heimagreiðslan, FR-kort og aðrar tænastur gera, at tað er minni tørvur á avgreiðslum við kassan í sparikassanum, og hetta er ein orsøk til, at vit lata deildina aftur, sigur Eyðfinn Reyðberg, sum er stjóri í Norðoya Sparikassa.

– Ein onnur orsøk er, at vit vilja styrkja ráðgevingina og tænastuna annars á hinum deildunum hjá sparikassanum, so viðskiftafólkini samanlagt fáa eina betri tænastu, sigur hann.

Ein fyrimunur

Norðoya Sparikassi ætlar at nútímansgera deildina við Klaksvíksvegin, eins og økt verður um parkeringsmøguleikarnar við høvuðsdeildina.

Norðoya Sparikassi hevur deildir í Klaksvík, Norðdepli, Viðareiði og í Lorvík.

Síðani 5. juli í 1993 hevur sparikassin havt deildina á Stangavegi, og nú átta ár seinni verður deildin latin aftur.

– Tað er við sorgblídni, at vit lata deildina á Stangavegnum aftur, men vit gera tað, tí vit halda, at tað í longdini verður ein fyrimunur fyri sparikassan og viðskiftafólkini, sigur Eyðfinn Reyðberg.